# Kunnu verða sjúk av at svimja í Sandagerði

**Kloakkvatn úr rottangum rennur í Sandagerð, og tí mælir býráðið fólki frá at svimja í ánni og í ósanum**

DÁLKING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tað er ikki longur heilt vandaleyst at svimja í Sandagerði.

Tað boðar Tórshavnar Býráð frá í dag.

Sostatt mælir býráðið fólki til at ansa sær, áðrenn tey fara út í Sandagerð at dusa sær í góðveðrinum í summar.

Og í sjálvari Sandá og í Ósanum, verður beinleiðis mælt frá at svimja.

Elin Lindenskov, forkvinna Heilsu- og umhvørvisverndini hjá Tórshavnar Býráð, sigur, at orsøkin til ávaringina er, at Helsufrøðiliga Starvsstovan hevur funnið ymsar bakteriur í ánni og í Ósanum.

Tað er í einum hyli oman fyri Eikina, at mælt verður frá at svimja, eins og tað heldur ikki er ráðiligt at fara útí í sjálvum ósanum.

Bæði í hylinum og í Ósanum er annars heilt vanligt at børn svimja og svansa í góðveðrinum.



*- Fólk verða nú ávarað ímóti at svimja niðarliga í Sandá og í ósanum, tí tað kunnu fólk gerast sjúk av, serliga børn*

Annars er tað vandaleyst at svimja longur úti á Sandagerði og í Sandagerðsvík, tí har er onki funnið.

## Dálkað av kloakkvatni

Tað eru koliformar bakteriur og termotolerantar bakteriur, sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur funnið ov nógv av í ánni og í ósanum.

Hetta eru bakteriur, ið liva í maganum á fólki.

- Vit mugu staðfesta, at tað er onkur kloakk, sum lekur út í ánna og í òsan við vatni úr septiktangum, sigur Elin Lindenskov.

Og tað kann elva til sjúku, serliga hjá smærri børnum, fáa tey dálkað vatn í seg.

- Tað er rættiliga nógv fólk í Sandagerði um summarið og tí hildu vit, at tað var rætt at binda um heilan fingur, sigur Elin Lindenskov.

## Longu í fjør

Tað var longu í fjør, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan staðfesti og nógvar bakteriur í ánni og ósanum. Men ein kanning er ov lítið til at taka eina avgerð á. Og tá ið vit gjørdi eina kanning afturat, varð verkfall og tí spiltist kanningarnar.

Samstundis skal tað verða ein ávísur hiti í luftini, tá ið kanningarnar verða gjørdar og tí eru tær ikki gjørdar aftur, fyrrenn í ár.

Tað er helst kloakkir frá onkrum síðugøtum til Velbaðstaðvegin, sum eru farnar at leka.

- Onkrar lekar hava vit funnið og teir verða gjørdir. Tað, sum er kommunalt, ger kommunan og tað, sum er privat, hava eigararnir fingið boð um at gera ístand.

Men um allir lekar eru funnir, er ilt at siga.

Elin Lindenskov sigur, at fáa fólk, kanska serliga børn, bakteriur í seg, kunnu tey gerast magasjúk og tí hevur býráðið valt at binda um heilan fingur og ávara almenningin, til viðurskiftini eru fingin í rættlag aftur.

Nú verða so skelti sett upp úti í Sandagerði, sum siga frá, at mælt verður frá at svimja í ósanum.

Annars skulu áhaldandi kanningar gerast fyri at vita, hvussu gongdin er og fyri at staðfesta, um allir kloakklekarnir, eru funnir.

Og ið Sandagerð er reint aftur, verður boðað frá, beinanvegin, sigur forkvinnan í Heilsu- og umhvørvisnevndini.

Hinvegin sigur hon, at ongin vandi er fyri at drepa grind í Sandagerði, tí grindir verða dripnar longur úti og tað verður heldur ikki skorið upp í Sandagerði.




Marknaðarrák

# Trichet stívari enn væntað

Aftaná heldur óvæntað stívt orðaljóð í farnu viku, frá stjóranum í evropiska miðbankanum, Trichet, eru sannlíkindini fyri eini rentuhækking afturat í ár økt. Marknaðurin hevur frammanundan mett, at leiðandi rentan, sum í dag er 2,75%, verður hækkað tvær ferðir í ár. Men nú er sannlíkindið økt, fyri at hendan kann hækka í 3,5% við árslok. Mánaðarliga arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin í USA var kunngjørd fríggjadagin. Hon vísti at færri fólk vóru sett í starv enn væntað og at mánaðarligi lønarvøksturin fyri juni, var tann higartil størsti seinastu fimm árini. Frágreiðingin saman við norðurkoreansku missilroyndarskjótingunum og methøga oljuprísinum gjørdi partabrævaíleggjarar ótryggar. Líkt er tó til, at marknaðirnir geva Norðurkorea lítlan ans, tí í gjár hækkaði m.a. suðurkoreanski partabrævamarknaðurin. Tó fara øll eygu at fylgja við, hvat næsta stigið í Norðurkorea verður.

## GN Store Nord ætlanir um sølu av GN-ReSound

GN niðurmetti í farnu viku útlitini fyri 2006 m.a. tí sølan av hoyritólum hevur gingið verri enn væntað. Hoyritóladeildin GN-ReSound hevur eisini havt minni vøkstur og verri inntøkur enn kappingarneytar, sum eitt nú William Demant. GN kannar tí í løtuni møguleikan at selja deildina. Prísurin er mettur til 8,25-10 mia. kr. Prísurinkann gerast hægri, um kappingarneytar og møguliga kapitalgrunnar fara at kappbjóða um GN-ReSound. Hetta fekk kursin á GN Store Nord at hækka, meðan William Demand lækkaði, tí teir kunnu hugsast at keypa GN-ReSound ov dýrt, um teir keypa GN-ReSound.

## Hesa vikuna

Næstu vikurnar verða spennandi í partabrævahøpi, nú heimsins leiðandi virkir fara at kunngerða roknskapir fyri fyrra hálvár. Hesa vikuna kunngerða m.a. Pepsi og General Electric. Tíðindi frá hesum og øðrum stórum virkjum kunnu, fara at ávirka gongdina á partabrøvum, eisini um okkara leiðir, men fleiri roknskapir mugu til áðrenn ein týðulig mynd sæst. Úr USA kunnu eisini sølu og brúkaraálitistøl fyri juni fara at ávirka marknaðirnar.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 586,08 | 0,6% | ↑ |
| JPY | 5,13 | 0,9% | ↑ |
| GBP | 1.078,64 | 0,5% | ↑ |
| NOK | 93,27 | -0,2% | ↓ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 97,29 | 0,1% | ↑ |
| | | | |
| Norrøn Partabrøv | 108,49 | 0,0% | ↓ |
| | | | |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*

Vika 28
2006